## Klumman



**Jákup Mørk**
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo

### Bon Jovi á Tórsvøll

RC 456, ávegis til Danmarkar: Á veg vestur á flogvøllin steðgaðu vit við rundkoyringina í Kollafirði, har ein duld heimsstjørna bíðaði við eini demo-fløgu til Rás2.

Hjá Atlantic á veg niður var flogfarið at kalla fullsett við veitsluklárum føroyingum, sum skuldu til Randers at vita, hvat ein onnur heimsstjørna, Bon Jovi, hevur at bjóða danum.

Tá áhugin er somikið stórur fyri Bon Jovi, hví kunnu onkrir konsertfyriskiparar ikki bara fáa mannin til Føroya at spæla. Íroknað flogferð, innivist, bilaleigu og hvat veit eg, so kostar ein slík konsertferð helst tíggjutúsundatals krónur, so ráð máttu verið at goldið tað, sum eitt slíkt navn kostar. Og tað kostar meira í Føroyum, tí vit vita jú, at ein millión ella meira skal leggjast afturat hjá føroyskum fyriskiparum, tá pallur, ljóðanlegg, mvG! og annað skal leggjast afturat atgongumerkjaprísinum.

Hvat nú – tankarnir ferðast eina løtu. Onkrar av okkara stóru fyritøkum lýsa við, at saman røkka vit á mál. Framtak stórar strategi'ir um, hvussu føroyskt vinnulív kann fjøltáttast. Á Samvit hoyra vit støðugt um, hvussu Føroyar skulu brandast, og sum vallyfti varð sagt, at milliónir skuldu í serligan tónleikagrunn.

Vit hoppa í øllum førum óført upp á vognin, tá onnur skulu brandast. Bon Jovi, McCartney, Rolling Stones ella hvør tað skal vera. So valfarta vit í hundraðtali avstað.

Hví ólukkan biðja vit ikki bara Bon Jovi koma til okkara? Hví gera vit okkum ikki somikið áhugverd, at stjørnurnar koma til okkara heldur enn øvugt?

Hattin av fyri teimum, sum fingu Bryan Adams á Tórsvøll. Eitt fantastiskt tiltakt. Eitt er, at vit við hesum fingið ein av teimum heilt stóru hendanvegin. Sum síðuvinning kundi eg so loksins bjóða klaksvíkingum til Havnar, heldur enn at tað altíð er øvugt.

Nei – lat okkum fáa Bon Jovi á Tórsvøll. Vit skriva nú 2008, og vit havnarmenn kunnu ikki í allar ævir liva við, at klakvíkingar eiga Føroya størsta – og besta – tónleikatiltak.

Í Føroyum er so eingin vilji at branda Jens Marna.

## Heini bloggar úr Ísrael

**Komandi tíðina fer Heini í Skorini, sum er í starvsvenjing á donsku ambassaduni í Tel Aviv, at skriva bloggar í vikuskiftisinnlegginum hjá Sosialinum. Heini fer at skriva um og úr gerandisdegnum í Ísrael.**



*Danska ambassadan í pakistanska høvuðsstaðnum Islamabad, sum 2. juni varð bumbað av muslimska felagsskapinum al-Qaeda. Felagsskapurin krevur eina umbering fyri tekningarnar av profetinum Muhammed, og álopið reisir aftur spurningin um prísin fyri ein aktivistiskan uttanríkispolitikk*

# Muhammed By Night

- Og hvat hava vit so fingið burturúr? Heima er forholdið millum danir og tilflytarar verri enn nakrantíð. Í Evropa verða vit sett í samband við intoleransu og fremmandaótta. Og vit eru vorðin eitt attraktivt mál fyri altjóða terroristar, sigur Hanne Foighel, korrespondentur á danska dagblaðnum Politiken, meðan hon slær knýtta nevan í myrkabrúna mahogni borðið, so gløsini klirra.

Meðan harðligu aldur Miðalhavsins bresta ímóti fyrndargomlu havnini í Jaffa, arabiska býnum skamt sunnanvert Tel Aviv, snýr prátið á stóru altanini í marglætisíbúðini hjá danska ambassadørinum seg um donsku ambassaduna í Islamabad, sum herfyri varð bumbað í stumpar og stykkir av muslimska yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda. Og prátið snýr seg eisini um prísin fyri ein aktivistiskan uttanríkispolitikk við hernaðarluttøku í Irak og Afganistan (hóast danskir hermenn eru farnir úr Irak – eitt taktiskt lokabragd upp undir valið í Danmark, sum harra Fogh slapp merkiliga snikkaleysur undan), og um handfaringina av tiltiknu Muhammed-tekningunum, sum elvdi til bál og brand í muslimska heiminum.

Hanne Foighel er ivaleys um, at danir eiga at endurskoða sín leiklut á globala pallinum. Men professarin á Tel Aviv University, Noah, sum eisini er boðin í reseptión hjá danska ambassadørinum í kvøld, er ósamdur.

- Evropeiski vinstravongurin var einaferð lokomotivið ímóti religiøsum myrkri og sjálvhátíðarligheit og gekk á odda fyri skrivi- og talufrælsinum, fyri tí kritiska sansinum og fyri tí opna samfelagnum, har eingin og einki er hevjað omanfyri kritiska viðgerð. Men í dag er hesin sami vinstravongurin vorðin meistari til at fella á knæ fyri einum og hvørjum fanatiskum fana, so leingi hesin hoyrir til ein minniluta, sigur eldri harrin við frísuta hárinum og ternutu skjúrtuni, meðan smølu eyguni hyggja strangt at frú Foighel. Sum ikki mutar ímóti.

**- Evropeiski vinstravongurin var einaferð lokomotivið ímóti religiøsum myrkri og gekk á odda fyri skrivi- og talufrælsinum, fyri tí kritiska sansinum og fyri tí opna samfelagnum, har eingin er hevjaður omanfyri kritiska viðgerð. Men í dag fellur hesin sami vinstravongurin á knæ fyri einum og hvørjum fanatiskum fana, so leingi hesin hoyrir til ein minniluta**

Eg kundi ikki verið meiri samdur. Tí hóast minnilutaverja er ein fastgrógvin partur av einum og hvørjum reystum fólkaræði, so má tað ongantíð verða ein kvalifikatión í sær sjálvum at vera minniluti, sum partú skal fáa viðhald, líkamikið hvat málið annars snýr seg um.

Og meðan reydliga sólin spakuliga hvørvur í sjónarringinum, og hvøllu bønirnar frá sunnimuslimsku moskuni í grannalagnum stíga til himmals, haldi eg fyri, at vinstravongurin í Danmark í fyrstu atløgu lat seg blinda av, at tekningarnar gingu út yvir ein minniluta, sum í einum nationalum samanhangi var hart kroystur, fyrst og fremst orsakað av islamofobisku herferðini hjá reyð-hvítu nationalistunum í Dansk Folkeparti.

- Men við ella uttan danskar rasistar, so broytir tað akkurát einki uppá, at muslimska kravið um eina umbering og kravið um, at religiøst viðkvæmi skal koma fram um rættin til at ytra seg um hvat sum helst, var eitt láturligt krav, sum tann fríði heimurin ongantíð skal góðtaka, sigur ísraelski professarin.

Aftur samdur. Tí prinsipiella kjarnan í málinum, sum Villy Søvndal, Tøger Seidenfaden og kompaní av fyrstan tíð ikki megnaðu at fyrihalda seg til, er, hvørt tað er í lagi ella ikki at tekna profetin Muhammed. Lukkutíð eru bæði Villy og Tøger vorðnir klókari eftir annað umfar av glantrileikinum um Muhammed, tá PET í februar steðgaði eini morðroynd á ein av seku teknarunum, Kurt Vestergaard. Villy bað "de muslimske mørkemænd gå ad helvede til", og Tøger prentaði tekningarnar "i solidaritet med Kurt Vestergaard".

Og so var knappliga semja í Danmark um, at ein minniluti av religiøsum muslimum skal sjálvandi ikki sleppa at diktera, hvørji virði okkara samfeløg skulu hvíla á. Hóast hann er ein minniluti. Og hóast hesin minnilutin má leggja oyra til eina flóðaldu av rasistiskum skarni í dagsins kjaki um útlendingar í Danmark. Hetta er logikkur fyri búrhønur, um vit bert megna at skilja sundur prinsipiella málið um tekningarnar og tónan yvir fyri útlendingum í Danmark generelt.

Í vakra mánalýsinum út ímóti midnátt síggi eg á vegnum heim frá danska ambassadørinum í Jaffa nakrar burkakløddar kvinnur baða í Miðalhavinum, meðan menninir sita á sandinum og roykja vatnpípu. Langt ímillum jødisku bikini-tøsirnar nakrar fáar kilometrar norðanfyri, har eg búgvi. Og so tilbiðja tey ein profet, sum ikki tolir nakrar erligar keipumyndir. Heilt erligt. Slíkt erkvisið og sjálvhátíðarligt hysterí hava vit altso ikki rúm fyri.

*heini_skorini@yahoo.com*